
POSTURIN UM JÓLINI



Jólaposturin til grannalondini skal vera á posthúsinum í Havn í seinasta lagi soleiðis:

Land	Bræva-og pakka-postur við skipi	Brævapostur við flogfari	Pakkapostur við flogfari
Danmark	12/12	16/12	13/12
Noreg	28/11	12/12	10/12
Norður-Noreg	28/11	12/12	7/12
Svøriki	28/11	12/12	10/12
Finland	28/11	10/12	9/12
Ísland	20/11	13/12	9/12
Bretland	28/11	10/12	4/12

Jólapostur í Føroyum, sum er á posthúsinum í Havn í seinasta lagi hósdagin 19. desember, kann vera frammi í øllum bygdum áðrenn jól. Veðurlíkindini kunnu gera, at posturin verður seinkaður, og fólk verða biðin um at senda postin í góðari tíð.

Posturin í Tórshavn, sum er komin til Havnar í seinasta lagi hósdagin 19. desember, verður útborin áðrenn jól. Sendingar uttan tilskrivt kunnu ikki sendast í døgunum 9.-24. desember.

Spiritussendingar í desember mánað verður ikki roknað við, at rúm verður fyri spiritussendingum í flogfarinum. Postverkið vil tí ráða til at umbiðja hesar sendingar í góðari tíð við skipi. Spiritussendingar, ið koma til Føroya við skipi tann 2. og 9. desember, verða ikki aftursendar fyrr enn eftir jól.

Postverk Føroya

GEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIA

Vit nærkast 3. drátti

— teimum 20 túsund krónunum



3. dráttur 20/12-85

1 vinningur á 20.000 krónur
1 vinningur á 5.000 krónur
8 vinningar á 12 pk. GEVALIA

Postsendið Gevalia-lokin »tey brúnu« til Postbox 16 - 3800 Tórshavn

Jú fleiri lok — tess størri møguleikar.

Góðan GEVALIA-drátt

Áður innsend lok koma eisini við í 3. drátti.

GEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIA

KUNNGERÐ

um broytingar í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Vágs kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 og løgtingslóg nr. 48 frá 21. mai 1974, verður við hesum boðað frá, at Vágs kommuna hevur ætlanir um at gera ávísar broytingar í galdandi býarskipan og byggisamtykt 1985-1995.

Broytingarnar umfata:

Víðkað bústaðarøkið B 1 á Gjógvarábøi, víðkað havnarøkið D 1 á Tjørn millum høvuðsgøtuna og fiskavirkið hjá P/f Polarfrost, víðkað ídnaðarøkið D 2 á Oyrunum og útlegging av nýggjum ídnaðarøki D 3 í Langadølum.

Broytingarnar hava við sær,

at matr. nr. 340, 417b, 433, 478a, 500a, 500a, 503a, 504a, 519, 520, 521 og 523 verða løgd til bústaðarøkið B1,

at matr. nr. 154b, 155, 164, 165, 166, 167, 169 og 171 verða løgd til havnarøkið D 1,ä

at matr. nr. 363a verður lagt til ídnaðarøkið D 2 og

at matr. nr. 56,331a og 488 verða løgd til ídnaðarøkið D 3.

Kort og onnur skjøl, ætlaðu broytingunum viðvíkjandi, liggja frammi fyri áhugaðum á kommunuskrivstovuni í Vagi frá mánadegi 2. desember til mánadagin 23. desember 1985.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, skulu vera Vágs býráði í hendi í seinasta lagi 2. mars 1986.

VÁGS BÝRÁÐ
27. november 1985

Posthúsið í Porkeri

Søkt verður eftir fólki til útbering av posti í Porkeri at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er 78 tímar um mánaðin. Løn sambært 1. lønarflokk í sáttmálanum millum Føroya Postfelag og Føroya Landsstýri.

Umsóknir skulu sendast í seinasta lagi 19. desember 1985 til

POSTVERK FØROYA
Bygdaavgreiðsluna
3800 Tórshavn

Skúlagenta søkist

at passa børn og vanligt húsarbeiði av og á.

Ringið tlf. 16216

Frá Tofta Ítróttarfelag

Eydnuhjólið byrjar fríggjakvøldið kl. 20.00 í felagshúsinum.

Lutir verða móttiknir við tøkk hóskvøldið kl. 19.00.

TOFTA ÍTRÓTTARFELAG